Fróðskaparsetur Føroya

11. mars 2004

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 3/2004**

Tíð: Hósdagin 19. februar 2004 kl. 9.00-11.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri Søgu- og Samfelagsdeildina
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri Føroyamálsdeildina
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri Náttúruvísindadeildina
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 2/2004 setursráðsfundi 12. februar 2004.** Góðkend við tillagingum.

**2.** **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Próvdómarasamsýningar.** (J.nr. 0015-01010). Samtykt at taka málið upp, tá námsskipanirnar eru gjørdar. Deildirnar gera uppskot til endurskoðan av tímanýtslu pr próvtøkuuppgávu, um tað verður mett neyðugt. Rektarin og Setursskrivstovan gera uppskot til nýtt tímatal fyri metingar og útrokning av fíggjarligum avleiðingum av hesum. Verður tikið uppaftur av setursráðnum til viðgerðar.

**4.** **Kunningarfundur haldast á Fróðskaparsetrinum fyri lestrarvegleiðarar á miðnámsskúlunum.** (J.nr. 0018-01323). Uppskot frá rektaranum at skipa fyri fundi um nýggju kunngerðina og námsskipanirnar. Samtykt at SSS bjóðar til fundar á Sjómansskúlanum síðst í mars. Felagsframløga og deildarframløgur – skulu samskipast áðrenn fundin

**5.** **Upptøka av studentum til lívfrøðilestur á Náttúruvísindadeildini lestrarárið 2004/05.** (J.nr. 0040-01127). *Fundarskjøl: Bræv frá NVD, dagfest 10.2.04, 2 s. Yvirlit yvir leysalæraralønir 2003 og 2004, 2 s.* HPJ greiddi frá ynskinum hjá Náttúruvísindadeildini um at taka lívfrøðistudentar upp í 2004/05 tí eingin upptøka var


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

í 2003/04. Setursráðið tók undir við hesum, við sama fyrivarni sum fyri øðrum upptøkum: at fíggjarjáttanin fyri 2004 loyvir hesum.

6. **Ritgerðakappingin *Tá gentur og dreingir gerast vaksin*. Dómsnevnd veljast. Evni til nýggja ritgerðakapping.** (J.nr. 0053-00516). Heitt verður á Eyðun Andreassen og Elin Súsonnu Jacobsen um at verða við í dómsnevndini. Turið Sigurðardóttir og Setursskrivstovan gera uppskot til nýtt evni.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 10.2.04.** (J.nr. 0011-00013). Onki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

8. **Jóan Pauli Joensen hevur tikið við aftur deildarleiðsluni á Søgu- og Samfelagsdeildini frá 1.2.04 og er eisini vararektari frá 1.2. til 30.11.04. At staðfesta.** (J.nr. 0011-00612). Staðfest.

9. **Lýsing eftir jarðalisfrøðingi. At staðfesta.** (J.nr. 0021-01293). *Fundarskjøl: Lýsingar á føroyskum og enskum, 2 s.* Staðfest.

10. **Próvdómaragóðkenning. Eftir áheitan frá Náttúruvísindadeildini er Mentamálaráðið biðið um at góðkenna Lars Ole Boldreel, fil.dr., lektor, Geologisk Institut á Københavns Universitet, sum próvdómara í *Verkætlan innan kolvetni*. At staðfesta. (J.nr. 0026-00781).** Staðfest.

11. **Góðskrivingar. Søgu- og Samfelagsdeildin mælir til hesar góðskrivingar:**
    a. **Anna P.L. Olsen fær *Mentanarfrøðiligt arbeiðslag 10 ECTS* í søgulestrinum góðskrivað fyri 3 skeið frá ársnámsprógvi í 2001, nevniliga *Grundskeið í mentanarfrøði 7,5 ECTS, Mentanarfrøði II 5 ECTS* og *Verkætlan í mentanargreinum 15 ECTS*.** (J.nr. 0046-01169). Staðfest.

    b. **Rúna Hjelm fær *Grundskeið í búskaparfrøði 5 ECTS*, *Grundskeið í hagtalsfrøði 5 ECTS*, *Grundskeið í vísindaástøði 5 ECTS* og *Grundskeið í sosiologi 5 ECTS* í B.S.Sc.-lestrinum góðskrivað fyri ávikavist *Økonomi grunnkurs*, *Brukerkurs i statistikk*, *Examen philosophicum normalvarianten* og 1/3 av *Organisasjonsteori* frá Fiskerikandidat-prógvi í 1996 frá Universitetet i Tromsø.** (J.nr. 0046-01235). Staðfest.

    c. **Joan Olsen fær *Grundskeið í vísindaástøði* 5 ECTS í B.S.Sc.-lestrinum góðskrivað fyri *Vísindaástøði*, sum hon hevur staðið á Føroyamálsdeildini 16.1.04.** (J.nr. 0046-01235). Staðfest.

**Kunningarmál:**

**12.** **Mánaðarjavni ultimo desember 2003, 1. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt Fróðskaparsetrið 17.182.600 kr = 88,6%.** (J.nr. 0015-00910).

**13.** **Morten Sparre Andersen sagt seg úr føstum starvi 31.1.04. Náttúruvísindadeildin hevur heitt á hann um at gerast adjungeraður professari á deildini.** (J.nr. 0022-0729). *Fundarskjal: Skriv til MSA, dagfest 28.1.04.*

**14.** **Hvítbókin NORIA "Nordisk forskning och innovation – globalt ledande genom ökat samarbete. En Vitbok om at bygga ut Norden till en ledande region för forskning och innovation" er send Fróðskaparsetrinum frá Mentamálaráðnum til viðmerkingar.** (J.nr. 0013-01294).

**15.** **Ráðstevna 27.2.04 "Kulturel mangfoldighed – i virksomheden og samfundet" á Handelshøjskolen i København, Center for Kommunikation.** (J.nr. 0057-00155).

**16.** **Kim Simonsen: Dreymar um opin vindeygu. Mentunargrunnur Studentafelagsins 2003. Hann fekk stuðul til útgávuna úr *Grunni Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* í 2003.** (J.nr. 0073-01087).

17. **Ritið "Modernisering af prøver, eksamener og karakterer", sum danska stjórnin hevur givið út í januar 2004.**

18. **Ráðstevna 1.-3.9.04 "Science Park as a tool for regional development: Possibilites and limitations" í Turku, Finnlandi, fyriskipað av University of Turku.** (J.nr. 0057-00155).

Frágreiðing: Annika Sølvará